# Løgreglan steðgaði 112 bilum í gjár

Í gjár var løgreglan í Vágum og steðgaði bilum. Gjøgnum dagin vórðu 112 bilar steðgaðir, men hesi skikkaðu sær rímiliga væl, tí bara 15 rapportir vórðu skrivaðar. Mest vanliga syndin var, at lyktirnar ikki vóru í lagið. Hetta vórðu 9 rapportir skrivaðar um. Bara eitt klipp varð givið gjøgnum dagin, og hetta var fyri at eitt barn ikki sat í seðla.



# Kvinna 40 dagar fyri at skera mann

Týskvøldið um midnáttarleitið, komu ein maður og ein kona til illnar. Sambært Bergleif Brimvík, kriminalovasta, var ein knívur havdur á lofti, og kvinnan skar mannin í armin við knívinum. Hetta skrivar Vágaportalurin. Løgreglan var á staðnum og tað endaði við, at kvinnan var tikin suður til Havnar at brumma, og nú seinni í gjár var grundlógaravhoyring. Kvinnan varð eisini dømd í gjár og fekk ein treytaðan dóm við 40 daga revsitíð, men við eini royndartíð upp á tvey ár, upplýsir Vágaportalurin.

# má bíða



eg gjarna vil hava ein flogvøll so tætt upp á Havnina sum gjørligt. Tað snýr seg um at fáa at vita, hvar Føroyar sum land fáa ta bestu loysnina, og vísir tað seg sum, at tann besta loysnin er í Vágunum, so verður jú farið undir at byggja víðari út í Vágunum. Men tað er týdningarmikið at fáa tað at vita, áðrenn tú fer at byggja út fult út, sigur John Johannesen.

Verður niðurstøðan tann, at ein altjóða flogvøllur liggur best onkra aðrastaðni, enn í Vágum, er John Johannesen greiður yvir, at neyðugt er at fara inn at hyggja uppá, hvussu landið kann kompensera fyri tey størv, ið verða flutt við flogvøllinum.

– Tað eru jú nógvar familjur í Vágum, sum basera teirra gerandisdag upp á at flogvøllurin er har, og tí má man so inn at hyggja uppá at fáa nøkur størv til oynna ístaðin fyri tey, sum eru nú. Men hetta má ikki forða okkum í at byggja ein flogvøll aðrastaðni, um kanningarnar vísa, at Vágar ikki eru besta loysnin, staðfestir John Johannesen.

### Nógv bendir á Glyvursnes

Upp undir løgtingsvalið í fjør var almennur fundur á Hotel Føroyum um flogvallarviðurskiftini og um týdningin av at hava ein altjóða flogvøll í Føroyum.

Tá tók eisini ein flogskipari hjá Atlantsflogi orðið og hann helt, at vit skulu ikki yvirdríva at brúka fleiri ár um at gera kanningar av turbulensi.

– Vilja tit hava nakað at vita um turbulens, skulu tit bara spyrja tyrluskipararnar, tí tað vita teir alt um, var heilsanin frá flogskiparanum til fundarfólkið.

Fyri einum ári síðani hevði Sosialurin samrøðu við royndan tyrluskiparan Bjarka Jensen, og hann helt, at skulu vit hugsa um at gera ein stóran, altjóða flogvøll í Føroyum, er tað bara ein møguleiki og tað er at gera hann í Suðurstreymoy.

Bjarki Jensen segði, at tað er tað lága, rundleitta lendið í Suðustreymoy, sum ger, at ongin turbulensur er har um leiðir.

Harafturat er Sandoyggin rættiliga fløt, samstundis sum at hon er nakað langt burtur og tí hevur hon ikki nakra serliga ávirkan á suðurendan á Streymoynni og á Nólsoynna.

- Í Suðurstreymoy er vítt til veggja. Suður og eystur í havið er púra onki fyri. Sostatt er Suðurstreymoy so langt frá fjøllum, sum tað yvirhøvur ber til at sleppa nakrastaðni í Føroyum.

### Kanningin kemur í vár

Í mars ella apríl mánaði kemur ein kanning av fýra møguleikum fyri flogvølli í Føroyum, í Vágum, á Glyvursnesi, í Skorðhæddini og í Søltuvík.

Henda kanning kann geva eina ábending um, hvat er tann frægasta loysnin, og inntil tær upplýsingar eru tøkar, er lítið sannlíkt at meiriluti fæst í Løgtinginum fyri at samtykkja uppskotið hjá Johan Dahl, landsstýrismanni í vinnumálum.

Ætlanin er at leggja málið fyri Tingið í desember mánaði, tá tað helst verða hópin av øðrum málum at viðgera í sambandi við Fíggjarlógina.

# Óðinn átti bestu plakatina



*Dómsnevndin og vinnarin av plakatkappingini, Óðinn K. Johansen, við vinnandi plakatini og vinninginum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í dag varð vinnarin avdúkaður í einiu plakatkapping, sum Dátueftirlitið hevði skrivað út millum ung. Óðinn K. Johansen gjørdist vinnarin við eini plakat, sum dómsnevndin helt var »Spot on!«**

KAPPING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Dátueftirlitið varpar ljós á eygleiðing og skipaði í hesum sambandi fyri plakatkapping fyri tannáringar, har evnið var eygleiðing.

Endamálið við plakatkappingini var bæði at kveikja áhugan millum ung fyri evninum og at finna eina plakat, sum frameftir kann vera ímyndin av evninum eygleiðing og tiltøkum, sum Dátueftirlitið skipar fyri í hesum sambandi.

Í dag varð vinnarin so kunngjørdur.

Vinnarin gjørdist 16 ára gamli Óðinn Katrinsson Johansen av Velbastað, sum strýkur avstað við vinninginum, sum er ein Iphone 3Gs frá Føroya Tele.

Dómsnevndin segði: Vinnandi uppskotið er tað, sum rakar málbólkin – ungdómin – best. Við einum málburði og stíli, sum møtir teimum ungu har tey eru, verður tosað til teirra í eygnahædd. Plakatin vísir hvussu útstillað vit kunnu vera á netinum. Í dag eru myndatól allastaðni – bæði vakmyndatól, í telefonum, í teldum – og sannlíkindini fyri, at vit vera avmyndað í einari óhepnari støðu er stór. Myndirnar á skíggjanum vísa dømi úr heimasíðuni Failblog.org, um júst hetta, at onnur leggja myndir um persónar og hendingar út til almenningin at síggja.

Við einum formi og stíli, sum tey ungu kenna aftur í, lýsir vinnandi uppskotið á hugtakið eygleiðing á ein einfaldan og beinraknan hátt.